Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Fólkaflokkurin og skattalætti

### *Oddagrein*

Í 25 ár hevur formaðurin í Fólkaflokkinum á Løgtingi - og málgagn hansara - skrivað um skattalætta. Almenn starvsfólk og talið av almennum starvsfólkum hevur verið knýtt í henda spurning. Seinastu árini hevur ein nýggj pensjónsskipan eisini verið knýtt at fyribrigdinum skattalætti. Afturat øllum hesum er alment virksemi næstan sett í mun til, hvussu sosialistiskt samfelagið er. Sumt av hesum varð endurtikið, nú Løgtingið í næstsíðstu viku umrøddi røðuna, løgmaður helt ólavsøkudag.

TÁ kreppan tók føroyska samfelagið av knóranum, varð neyðugt at hækka skattatrýstið munandi. Tað varð so høgt, at tað fór upp um danska skattatrýstið, sum er millum tey hægstu í landinum. Men tá búskapurin batnaði nakað, lækkaði landsstýrið, sum tá sat við Edmundi Joensen sum løgmanni og Jóanesi Eidesgaard sum landsstýrismanni í fíggjarmálum, skattatrýstið við meiri enn 100 milliónum krónum. Tað merktist!

HETTA landsstýrið skrædnaði, og Fólkaflokkurin kom uppí. Hesin flokkurin, sum hevur talað fyri minni persónsskatti í 25 ár, fekk fíggjarmál at umsita. Eisini hetta tíðarskeið varð tosað um skattalætta og sjómenn fingu eina skipan, sum ger, at teir sleppa væl minni í skatti. Tey flestu, sum ásanna tann týdning, fiskimaðurin hevur, unna fiskimonnum henda lætta. Kortini eru tað mong, sum ikki skilja, hví inntøkubólkar, sum liggja oman fyri hálva millión krónur, skulu fáa tað sama í skattalætta, sum onnur forvinna í eitt heilt ár. Tað mátti borið til at lagt eitt loft í hesa skipan, so skattalættin minkaði og hvarv heilt, tá inntøkan fór upp um eitt vist.

HINVEGIN hevur vanligi borgarin ikki merkt nakað til lægri skatt. Tvørturímóti eru flestu gjøld hækkað, og lítið rekist fyri, at skattalættin, sum skuldu latast í samband við eina nýggja eftirlønarskipan, kemur í bræði. Uppskotið til nýggja eftirlønarskipan, sum skuldi síggjadagsins ljós fyri einum ári síðani, er ikki liðugt. Frá tí at tað uppskotið verður lagt fyri Tingið, og til ein skattalætti fer at merkjast, fer so long tíð at ganga, at hetta valskeiðið er runnið, men so kann formaðurin í Fólkaflokkinum jú brúka málið í næsta valstríðið. Harafturat hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum sagt, at skatturin kann ikki lækka, tí so fara fólk at brúka ov nógvan pening. Hetta sigur maðurin, sum skal sigast at umboða ein verkaflokk!!!

SAMANUMTIKIÐ er skattatrýstið ikki lækkað fyri vanliga borgaran, meðan Fólkaflokkurin hevur sitið í landsstýrinum seinastu fýra árini. Harafturat er talið av almennum starvsfólkum ongantíð verið so stórt sum nú. Fyrisitingin er bólgnað og lýsingar eftir fólki í almenn størv fylla bløðini. Hetta er einki enn ein framman á fyri fólkaflokspolitikk floksins propaganga á hesum øki seinastu 25 árini!

***Sosialurin***

# Fundast á Svalbard

*Norðulendsku fiskimálaráðharranir og landbúnaðarmálaráðharranir hava fund á Svalbard til hósdagin tann 17. august*

ÓLAVUR Í BEITI

Í tíðindaskrivi frá Fiskimálaráðnum verður m.a. sagt, at høvðusevnið á fundinum á Svalbard er matvørutrygd, genetiskt tilfeingi og lívfrøðiligt margfeldið, burðardyggur fiskiskapur, umhvørvismerking av fiski og fiskavørum og havumhvørvi.

– Ráðharrarnir skulu á fundinum eisini taka saman um arbeiðið við umhvørvismerking av fiski og fiskavørum, røða um kriterir fyri merking (certificering) av burðardyggari fiskivinnu, tørvin av at knýta umhvørvisspurningar uppí umsitingina av fiskivinnuni.

Og víðari verður sagt, at ráðharrarnir fara at leggja ein nýggja ætlan fyri norðurlendska fiskivinnusamstarvið næstu 4 árini.



**Felagsfundur**

Í gjár felagsfundur millum fiskimálaráðharranar, landbúnaðarmálaráðharrarnar og umboð fyri vinnuna. Evnini eru tvey, annað er um matvørutrygd, har danski matvørumálaráðharrin Ritt Bjerregaard leggur fyri, meðan seinna evnið er genetiskt tilfeingi og lívfrøðiligt margfeldið, har Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri leggur fyri.

Í Føroysku sendinevndini eru umframt landsstýrismannin: Kaj P. Mortensen, fiskimálastjóri, Eyðfinnur Finnsson, fulltrúi, Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag, Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag og Marita Rasmussen; samskipari í Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Annars kunnu nevnast nøvn sumn Svend Auken, umhvørvis- og orkumálaráðharri í Danmark, Kalevi Hemila, landbúnaðarmálaráðharri í Finland, Árni Mathiasen, fiskimálaráðharri í Íslandi, Otto Gregussen, fiskimálaráðharri í Noreg, Bjarne Håkon Hanssen, landbúnaðarmálaráðharri í Noreg, Roger Jansen, landsstýrislimur úr Ålandi, Simon Olsen, landsstýrislimur í vinnumálum í Grønlandi sum eru við á fundinum.

# Fasta sambandið nærkast



*Tað nærkast alsamt, til byrjað verður upp á arbeiðið við vegagerðina í samband við undirsjóvartunnilin undir Vestmannasundi*

**Fútaklettur:** Fyrsti arbeiðisskúrurin er komin at standa við vegin oman á Fútaklett. Fyrsta tekinið upp á, at nú fer okkurt at henda við fasta sambandinum um Vestmannasund.

Tað stendur ein skúrur við myrkabláa litinum hjá byggifelagnum J&K Petersen niðan fyri høvuðsvegin av Oyrargjógv. Lítið ásýniligur hjá honum, sum bara skundar sær til ella frá ferjuni. Men skríggjandi gulu vindskeiðirnar boða frá, at her er komið eitthvørt, sum ikki hevur verið har.

Og vágafólk frøast um, at nú fer endiliga okkurt at henda í hesum fyri teimum so týdningarmikla máli.

Líkt er nú til, at umstrídda málið endiliga verður loyst, og farið verður í gongd við at grava fyri vegnum.

Tey bíða spent í Vágum.

**ej**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi

**OLAF ELIAS SOFUS HANSEN**

ættaður úr Fuglafirði, andaðist í heiminum í Søldarfirði leygardagin 12. august, 84 ára gamal.

Kistan fer úr Elim í dag kl. 17.00. Jarðarferðin verður úr kirkjugarðskapellinum í Havn mikudagin 16. aug. kl. 14.00. Sungið verður úr Songbók Guds fólks.

*Familjunnar vegna*
**børnini**

Tey ið vilja minnast Olaf kunnu lata Elim í Søldarfirði eina gávu.



# Skriva frágreiðing um útblakaðan fisk

*Fiskirannsóknarstovan arbeiðir við at skráseta fisk, sum verður tveittir fyri borð. Áðrenn jól kemur ein frágreiðing um støðuna*

DIA MIDJORD

– Eg haldi ikki, at útblaking av fiski er ein stórur trupulleiki í løtuni, sigur Hjalti í Jákupsstovu, stjóri á Fiskirannsóknarstovuni.

Fiskirannsóknarstovan hevur seinastu tvey árini skrásett, hvussu nógv av fiski fer fyri skeytið. Og tað er einki at dylja yvir, at fiskur verður tveittir fyri borð aftur, hóast lógin sigur, at einki má tveitast fyri borð aftur.

– Fiskur fer fyri borð í størri og minni nøgdum, staðfestir Hjalti í Jákupsstovu. Serliga er talan um fisk, ið ikki er handilsvøra ella tað ikki er marknaður fyri í Føroyum. Nevnast kunnu skrubba, skøta, hávur og krabbi.

– Í einum størri landi er ein marknaður og keyparar til hesi fiskasløg, men í Føroyum tykist hetta verða trupult. Onkur hevur fingist eitt sindur við hetta, sigur stjórin á Fiskirannsóknarstovuni.



**Ikki politi**

Hjalti í Jákupsstovu sigur, at teir í løtuni hava fólk við umborð á fiskiskipum.

– Vit eru umborð fyri at skráseta, hvat tað er sum hendir viðvíkjandi útblaking av fiski, sigur hann og leggur aftrat.

– Vit hava ikki skyldu at boða Vaktar & Bjargingartænastuni frá. Vit bert skráseta og eru ikki politi, sigur hann.

Úrslitið av hesum skrásetingum kemur einaferð áðrenn jól.

# Ein dýr søga



*Tað kemur meira enn so fyri, at hestar slíta seg leysar ella rýma úr innhegnaða økinum Tilvildarlig mynd: Álvur Haraldsen*

*Verður aktingarmaðurin boðsendur í sambandi við leysgangandi dýr, mást tú rinda nógv fyri at fáa dýrið aftur*

DIA MIDJORD

Hvønn einasta dag fær løgreglan fráboðan, um dýr sum ganga leys. Og hesi boð verða givin víðari til aktingarmenninar hjá kommununi. Teir koma á staðið og fara avstað aftur við dýrinum.

Og tað kostar ikki einki, um aktingarmenninir verða boðsendir. Taka teir eitt nú ein hund, tí eigarin ikki røkir uppgávu sína, má hesin gjalda um 600 krónur fyri at fáa hundin aftur.

Verður hundurin ikki heintaður innan tríggjar dagar, so verður hann avlívaður.

– Allir hundar, ið aktingarmaðurin tekur sær av, verða lýstir á talvu í miðbýnum í trý døgn og gott væl tað, áðrenn teir verða avlívaðir, sigur Peter Poulsen, leiðari á politistøðini í Havn.

Hann leggur dent á, at talan er um hundar, ið einki frámerki hava. Stendur eitt telefonnummar á hálsbandinum, so verður ringt og sagt frá.

**Óvanligur gestur**

Hóast politistøðin dagliga fær fráboðanir um leys kríatúr, so er meiri sjáldan, at kettur verða tiknar.

– Nakrar fellur eru ymsastaðni, har fólk eru illa plágað av kettum, men tað er ikki so ofta, at kettur verða fangaðar, sigur Peter Poulsen.

Ketturnar hava eisini tann fyrimunin, at eru tær í hálsbandi, so verða tær sleptar aftur.

Umframt hundar og einstakar kettur, so fær politistøðin eisini fráboðan um leysgangandi kríatúr.

– Tað kemur meir enn so fyri, at vit blíva uppringdir tíðliga sunnumorgun av illum fólkum, tí ein hestur stendur og hugnar sær í havanum, sigur Peter Poulsen, støðleiðari á politistøðini í Havn.

# Alibátur rendi á land

*Tíðliga sunnumorgunin fekk løgreglan fráboðan um ein bát, ið var farin á land við kirkjutangan í Nólsoy*

DIA MIDJORD

Fólk, ið sigldu til Havnar við Rituni tíðliga sunnumorgunin, boðaðu frá um alibátin, ið hoyrir til á Glyvrum, sum hevði siglt á land.

– Sum fráboðanin ljóðaði, vóru menninir umborð ávirkaðir, sigur Peter Poulsen, støðleiðari í Havn.

Hann sigur víðari, at eingin skaði kom á bátin, sum nakað seinni bleiv bjargaður og lagdur til bryggju í Nólsoy.

– Vit koma at skriva eina sak, og eftir øllum at døma verður onkur skuldsettur í málinum, sigur Peter Poulsen.

Tað var annars Ovastevna í Nólsoy um vikuskiftið. Løgreglan veit ikki enn at siga, um báturin var á veg til ella frá oynni.

# Brustu saman í miðbýnum

Tveir ungir menn av bygd brustu saman náttina til leygardagin í miðbýnum í Havn. Politiið kom á staðið og tók teir báðar við sær á støðina. Í næstum fáa teir eitt sektaruppskot fyri brot á politiviðtøkurnar frá fútanum.

Politistøðin fekk eisini tvær fráboðanir um harðskap. Í báðum førum var talan um persónar, ið kendu seg harðliga viðfarnar.

Tveir mans svóvu á støðini um vikuskiftið, tí kenningin var í størra lagi. Ein persónur bleiv eisini tikin fyri rúsdrekkakoyring.

Og tvær fráboðanir um herverk vóru eisini um vikuskiftið. Talan er í báðum førum um brotnar handilsrútar í miðbýnum.

